# Evran viðkvom

Hóast bjørt útlit í síðstu viku megnaðu marknaðirnir ikki at halda tørn, og úttalilsir frá nýggja italska ES-oddamanninum sendu mánadagin marknaðirnar niðureftir. Europeiski tjóðbankin seldi í vikuni jenn fyri at lækka um virðið. Evran er viðkvom fyri viðmerkingum um framtíðina.

Fíggjarmarknaðirnir hava seinastu vikuna verið sera skiftandi. Seinasta vikan var merkt av kurshækkingum. Hesar kurshækkingar, sum vóru tær fyrstu í longri tíð, komu í kjalarvørrinum á amerikanskum almannakunngerðum av prishækkingum, sum vístu, at amerikanska inflatiónin er ikki vaksandi, sum marknaðirnir áður hava verið bangnir fyri. At amerikanski tjóðbankastjórin - Alan Greenspan - harafturat segði, at hann metti, at ein lítil rentuhækking var nóg mikið fyri at tálma amerikanska búskapin, sendi altjóða marknaðirnar uppeftir.

Mánadagin lækkaðu marknaðirnir tó munandi aftur, tá nýggi ES-oddamaðurin - Romano Prodi - segði, at um Italia ikki er ført fyri at lúka búskaparligu treytirnar fyri luttøku í EVRO-samstarvinum, er neyðugt, at teir taka seg úr hesum samstarvi. Hetta leyp hvøkk á marknaðirnar, og Prodi hevur ikki megnað at vent hesi gongd við at tikið úttalilsini aftur.

### Kurslækkingar

10-ára danska statslánsbrævið - 6% st. lán 2009 - kostaði kl. 12 í gjár kostaði 109,35 móti 109,50 fyri viku síðan. 2-ára statslánsbrævið - 4% Stgb 2001 - kostaði 100,80 móti 100,94 fyri viku síðan. Tað føroyska lánsbrævið - 5% FRL 1999 - kostaði 100,70, sum svarar til eina effektiva rentu á 3,39%.

### Japanski jennurin viknaður

Batnandi útlit fyri japanska búskapin hava seinastu tíðini styrkt um jennin og harvið minkað um japanska kappingarførið. Hetta fekk seinasta fríggjadag evropeiska tjóðbankan, eftir áheitan frá japanska tjóðbankanum, at selja jenn fyri at fáa virðið at falla. Hetta var fyrstu ferð, evropeiski tjóðbankin royndi nakað tílíkt, og sum ein eyka vinning styrknaði evran samstundis. Japanski jennurin kundi í gjár á middegi keypast fyri 5,8969 móti 5,9408 fyri viku síðan.

### Norska krónan styrknað

Norska krónan styrknar framvegis. Sum væntað lækkaði norski tjóðbankin rentuni í síðstu viku við 1/2 %. Prísvøksturin í Noreg tykist verða lækkandi, og saman við hækkandi oljuprísum styrkir hetta norsku krónuna. Norska krónan kundi í gjár á middegi keypast fyri 91,81 móti 90,75 fyri viku síðan.

FØROYA BANKI



















| Peningamarknaðarrentur, DKK (CIBOR) | 22. juni 99 | 15. juni 99 | 22. juni 98 |
|---|---|---|---|
| Diskonto* | 2,75% | 2,75% | 3,75% |
| 1. mánað | 3,00% | 3,07% | 4,10% |
| 3. mánaðir | 3,07% | 3,14% | 4,11% |
| 6 mánaðir | 3,14% | 3,20% | 4,14% |

*) Seinast broytt hin 9. apríl 1999

| Gjaldoyra | 22. juni 99 | 15. juni 99 | 22. juni 98 |
|---|---|---|---|
| Amerikanskur dollari | 717,76 | 714,58 | 684,73 |
| Enskt pund | 1140,64 | 1145,58 | 1139,60 |
| Evra* | 743,24 | 743,02 | |
| Norsk króna | 91,81 | 90,75 | 90,10 |
| Japanskur yen | 5,8969 | 5,9408 | 4,9428 |

*) Kursurin á hinum europeisku gjaldoyrunum kann roknast við støðið í Evruni.

| Lánsbrøv | 21. juni 99 | | 14. juni 99 | | 22. juni 98 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Kursur | Eff. renta | Kursur | Eff. renta | Kursur | Eff. renta |
| 5% Føroya Landst. 1999* | 100,66 | 3,47% | 100,65 | 3,57% | 100,10 | 5,12% |
| 4% Stgb 2001 | 100,96 | 3,38% | 100,85 | 3,46% | 99,06 | 4,38% |
| 6% St. lán 2002 | 107,17 | 3,70% | 106,74 | 3,86% | 105,41 | 4,60% |
| 6% St. lán 2009 | 110,43 | 4,71% | 109,11 | 4,86% | 107,87 | 5,07% |

*) Vegna lítlan handil í lánsbrævinum eru kursurin og effektiva rentan 21. juni 1999 útroknað út frá tilsvarandi donskum lánsbrøvum. Av somu orsøk eru tølini fyri undanfarnu dagarnar ikki altíð eitt haldgott mát fyri veruliga marknaðarkursin tann ávísa dagin.



Í dag og í morgin hevur almenningurin møguleika at síggja, hvat GEM-verkætlanin snýr seg um. Müllers Pakkhús er pyntað við skeltum, myndum og teldum, ið vísa, hvussu verkætlanin kortleggur øll vandamál, sum kunnu standast av boringum eftir olju í føroysku undirgrundini Mynd: Alan

# Olja og umhvørvi hond í hond

Nevnir tú olju ella oljuleiting og -virksemi, so hugsa tey flestu um pengar. Summi hugsa um dálking, meðan tey, sum fáast við sjálva vinnuna, hugsa mest um tað vælsignilsi, sum oljan hevur við sær: eitt nú heilivág

LEIF LAADAL

Á framsýningina í Müllers Pakkhúsi, sum GEM skipar fyri í dag og í morgin, ber til hjá almenninginum at kunna seg um, hvat ið verður gjørt fyri, at árinini frá dálking í sambandi við eina komandi oljuvinnu í Føroyum, verða so lítil sum gjørligt.

GEM, ið er ein verkætlan, sum millum annað hevur til endamáls at kortleggja øll vandamál, sum kunnu standast av boringum eftir olju í føroysku undirgrundini. GEM arbeiðir við at alt neyðugt tilfar skal vera til taks hjá teimum, sum stýra vinnuni ella ætla sær undir oljuvinnu í Føroyum. Tankin er, at føroyingar skulu verða uppá »forkant« við møguligar trupulleikar, og júst hesin tankin er góður. Tíðan verri er tað ringt at finna nakran í vinnuni, hvørki frá tí almenna ella frá tí privata, sum rættiliga kann siga nakað um hvussu stórur vandin er fyri, at oljan kann koma at skaða eitt nú fiskivinnuna. Tær frágreiðingar, sum higartil eru lagdar á borðið, vísa mest sum allar til ta óvissu, sum er við eini komandi oljuvinnu við Føroyar. Orsøkin til hesa óvissu stavar frá tí faktum, at eingin áður hevur bora eftir olju her.

### Ongin varandi loysn

Onkur flokkur í sitandi landsstýri hevur reist spurningin um oljuvinnu kontra fiskivinnu. Í hesum sambandi verður víst á, at oljuvinnan ikki er ein varandi vinna, tá ið hugsa verður um, at keldurnar fyrr ella seinni eru tómar. Fiskivinnan harafturímóti er ein vinna, sum við rættari stýring kann halda í nærum allar ævir.

GEM stýrisbólkurin roynir at samla inn øll neyðug hagtøl, sum millum annað kunnu kunnað politikarnar um teir fyrimunir og vansar, ið eru við eini komandi oljuvinnu. Verkætlanin er sett í verk av áhugaðum í føroysku undirgrundini.

23 oljufeløg hava í samstarvi við oljumálastýrið og føroyskar vísindastovnar sett sær fyri, at fáa so nógv at vita um føroyska havumhvørvið sum gjørligt.

Tiltakið snýr seg um jarðtøkni, umhvørvi og veður- og havfrøði, og hesi øki verða gjøgnum GEM samanborin á tann hátt, at økini verða vigaði upp ímóti hvørjum øðrum, so árini frá hvørjum einkultum øki verður lagt í fastar rammur; í GEM rammur.

### Plastikk og heiligvágur

Framsýningin í Müllers Pakkhús er opin í dag og í morgin og umboð fyri tey feløg og stovnar, sum eru við í verkætlanini verða at hitta í pakkhúsinum. Tey vitjandi hava møguleika at spyrja og fáa svar uppá tað, sum tey ivast í, ella hava áhuga fyri, í sambandi við eina komandi oljuvinnu við Føroyar.

Oljusamtøkini hava eisini síni umboð við á framsýningini, og pakkhúsið er pakkað við upplýsandi tilfari og hartil trimum teldum við internetsambandi til tær heimasíður, ið eru áhugaverdar fyri verkætlanina.

Oljufeløgini brúka stóra orku uppá at siga fólki, at tey eru væl við, tá ið tað snýr seg um umhvørviskanningar. Hesar liggja frammi frammanfyri nærum allar »básarnar«. Ein av hesum kanningum liggur framman fyri eitt skelti, sum við vøkrum orðum roynir at siga okkum, hví vit hava tørv á olju. Svarið uppá hendan spurningin ljóðar soleiðis:

*Umframt at vera ein týðandi orkukelda, so er olja eisini ein høvuðsrávøra, ið verður nýtt í nógvum vørum, sum eru náttúrligir partar av gerandisdegi okkara, so sum plastikk, heilivágur, klæði, landbúnaðarføður og mannaføði.*

---

Tíðindaskriv:

## Føroyskt fullveldi: www.fl.fo

Landsstýrið hevur gjørt eina heimasíðu um fullveldisætlanina

Nú er ein heimasíða um fullveldisætlanina hjá landsstýrinum komin á internetið. Á síðuni verður greitt frá grundgevingunum hjá landsstýrinum fyri at fara undir ætlanina, hvussu arbeiðið er skipað, og hvussu ætlanin er, at farast skal fram inntil fólkaatkvøðurnar verða komandi ár.

Á heimasíðuni er eisini tilfar um tey týdningarmestu stigini, sum eru tikin í fullveldisgongdini higartil, har er tilfar um arbeiðið við Hvítubók, har er allur arbeiðssetningurin hjá grundlógarnevndini o.m.a.

Tær almennu grundgevingarnar hjá teimum flokkum, sum atkvøddu ímóti løgtingsuppskotinum um fullveldisætlanina, eru eisini at finna á heimasíðuni.

Heimasíðan er at finna undir heimasíðuni hjá landsstýrinum: www.fl.fo

# Føroya Tele høvuðsstuðul á Oyggjaleikunum

Føroya Tele ger um seg á fleiri økjum á Oyggjaleikunum. Tey lata búnar til føroysku luttakararnar. Tey hjálpa til við tíðindaflutningi. Og tey hava bøtt um samskiftið við Gotland

INGI RASMUSSEN

Búmerkið hjá Føroya Tele fer at fylgja teimum føroysku luttakurunum, sum í næstum skulu gera sítt ítarsta fyri at vinna Føroyum heiður og æru á Oyggjaleikunum, sum vera á Gotlandi í næstum.

Oyggjaleikirnir, sum eru vorðnir fremsta málið hjá flestu ítróttargreinum í Føroyum, eru serliga gott høvi hjá føroyskum ítróttarfólki. Fleiri ítróttargreinir í Føroyum hava ment seg stórliga við teimum javnbjóðis avbjóðingum, sum leikirnir hava givið.

– Slík tiltøk eru uttan iva við til at menna føroyska samfelagið, og tí hevur Føroya Tele valt at arbeiða saman við Oyggjaleikanevndini og vera høvuðsstuðul á Oyggjaleikunum 1999, sigur Annika Johansen, sum starvast á marknaðardeildini hjá Føroya Tele.

Eitt nú hevur Føroya Tele latið venjingarbúnarnar til allar føroysku luttakararnar á Oyggjaleikunum 1999.

Føroya Tele hevur harafturat gjørt samstarvsavtalu við tíðindablaðið Sosialin og Útvarp Føroya um tíðindaflutning, so at tíðindi og úrslit av Gotlandi verða dagførd á eini heimasíðu á internetinum, so hvørt tiltøkini fara fram.

Heimasíðan um Oyggjaleikirnir verður tøk frá í dag á adressuni *www.ol.fo*

Føroya Tele hevur eisini gjørt sítt til, at samskiftið er bøtt munandi við Gotland, nú Oyggjaleikirnir verða. Føroya Tele hevur fingið GSM samskiftisavtalu í lag við Europolitan, sum er ein svenskur kervisveitari. Hetta hevur við sær, at føroyskar GSM fartelefonir kunnu nýta netið hjá Europolitan – eisini á Gotlandi. Samstundis kunnu GSM felagar hjá Europolitan nýta netið hjá Føroya Tele.

– Vit á Føroya Tele eru glað fyri, at vit á henda hátt kunnu stuðla slíkum ítróttartiltaki, sum hevur so stóran týdning fyri føroyska ítróttarheimin, sigur Annika Johansen av marknaðardeildini hjá Føroya Tele.



Føroya Tele hevur latið búnarnar til øll tey føroysku ítróttarfólkini, sum fara at kappast fyri Føroyar á Oyggjaleikunum í ár